# Nýggi Vágbingur flotaður

*Leygardagin flotaðu vágbingar nýggja kappróðrarbátin Vágbing. Skipað varð fyri rættiligari hugnaløtu á Garðabrúnni og eisini vóru ymisk tiltøk henda dagin*

DAGFINN OLSEN

Leygardagin var veðrið av tí fagrasta um landið. Summarið tykist vera komið og so eru stevnurnar í hondum.

Vágbingar eru millum teirra, ið hava latið bát smíðað, nú tað stundar til stevnukappróður.

Leygardagin varð nýggi Vágbingur flotaður og í hesum sambandi var rættur fagnaður. Skipað var fyri niðri á Garðabrúnni, sum nýliga er umvæld. Jógvan Krosslá, býráðsformaður helt røðu og Nýggjarársnevndin handaði Kappróðrarfelagnum peningagávu.

Nógv fólk var komið saman og tey hugnaðu sær, tí eisini vóru pannukøkur og kaffi at fáa. Eisini kundu tey, ið høvdu hug, leiga sær ein túr á vatnscootara. Sum heild ein løta við nógvum lívi á Vágsfirði, har unglingar eisini stóðu á vatnskí.

Nýggi Vágbingur stóð sína roynd, tá hann dystaðist ímóti gamla bátinum. Fyrsta róðurin vann gamli báturin, men seinna dystin vann nýggi Vágbingur. Hann verður ein av mongu nýggju bátunum, sum spennandi verður at síggja royna seg á stevnunum í ár.

**Nógv tiltøk**

Høvi var eisini hjá fólki at vitja innar í Stóra Pakkhús, ið stendur við Garðabrúgv. Fleiri feløg hava tikið seg saman og keypt húsini. Saman við Føroya Fornminnissavnið eru ætlanir um at gera húsini í stand og høvi var at síggja tekningar yvir húsini, ið skulu varðveitast so nær upprunalíki, sum gjørligt.

Onnur tiltøk vóru eisini henda hendingaríka dag. Vágs Matmøðrafelag skipaði fyri tombola, kaffisølu og listaframsýning í felagshølum sínum. Henda sýning er opin í dag afturat.



Býráðsformaðurin Jógvan Krosslá helt røðu, tá nýggi Vágbingur varð flotaður



Vágbingar flotaðu leygardagin nýggja kappróðrarbátin Vágbing

**Myndir: Dagfinn Olsen**





# Nýggj rør í Botni

*Fyri aðru ferð verða rørini nú skift til elverkið í Botni, sum var fyrsta elverk í landinum*

**Mynd: Dagfinn Olsen**



SEV er farið undir at skifta vatnrørini oman í Botn í Suðuroynni. Rørini gangan oman til el-verkið í Botni og rørini eru gomul og vánalig og mugu tí skiftast. Talan er um betongrør, sonevnd bonna rør.

El-verkið í Botni er fyrsta el-verk, ið føroyingar fingu. Verkið er frá 1921 og einaferð fyrr eru rørini skift. Upprunaligu rørini vóru úr stáli.

Hóast partur av SEV, so er Suðuroyggin ikki partur av el-kervinum í meginøkinum, men er fyri seg. Eitt verk er í Vági, eitt á Tvøroyri, umframt verkið í Botni.

Sum menninir í Botni skemtiliga taka til, so er ikki víst, at fyri tað um Black Out er í Havn, at tað sama er galdandi hjá teimum.

Arbeiðið við at skifta rørini í Botni er væntandi liðugt 1. september í ár

*- do -*

# Trílemba



Góðveðrið er komið og smálombini síggjast á bønum.

At síggja ær, ið hevur meira enn eitt lamb, er ikki óvanligt.

Heldur ikki í Suðuroynni eru tvílemburnar óvanligar. (Í Suðuroynni nevnt ein tvílba).

Men eins og aðrastaðir í landinum, so er longri ímilum trílemburnar, hóast tær helst eru vanligari nú, enn fyrr.

Leygardagin fekk henda ærin 3 lomb, ið øll komu væl undan, hóast likkur og krákur hildu eyguni eftir teimum. Tað er Tórður Poulsen í Vági, ið eigur hesa trílembuna.

# Komu aftur við fyrstu virðisløn

*Tveir næmingar úr Nes Sóknar Musikkskúla, ið vóru við í eini tónleikakapping í Keypmannahavn, sum blaðhúsið Berlingske skipar fyri, gjørdu musikkskúlanum miklan heiður og komu aftur við fyrstu virðisløn*

Tær báðar genturnar úr Runavík, Bodil Simonsen og Fríðhild Hansen, hava í átta ár spælt tvørfloytu í Nes Sóknar Musikkskúla. Núverandi lærari teirra, Katja Volovelskaja, avgjørdi í heyst at melda tær til hesa kapping niðri í Danmark. Fyri at vera við í kappingini skalt tú ikki vera fyltur 17 ár. Tær ganga í 10. flokki, so skuldi tað vera, so mátti tað vera nú. Lærarin metti, at tær nú vóru á einum slíkum støði, at tað mundi fara at bera til. Áræði hava tær alla tíðina havt, so har var einki at ivast í.

Í longri tíð hava tær báðar vant dúgliga bæði heima og í skúlanum. Mangan hava tær havt floyturnar við í skúla, soleiðis at venjast kundi í fríkorterunum. Katja, ið hevur givið teimum dygga undirvísing hesi bæði seinastu árini, hevur roynt at útvegað teimum allar teir venjingarmøguleikar, ið til bar. Ein stuðul í hesum arbeiði, hevur Jóhannes Andreasen eisini verið. Hann hevði fylgispælið bæði til venjingarnar her heima og til kappingina í Keypmannahavn.

Mikukvøldið í síðstu viku var konsert í býráðshøllini í Runavík, har Fríðhild og Bodil fingu høvi at vísa áhoyrarunum, hvat tær dugdu til. Tær komu væl frá sínum kappingarstykki og kundu tí við góðum treysti fara av landinum. Leygardagin skuldi so slagið standa á Flatlondum. Tær vístu, at eisini tá ið á stendur, er stirðil í teimum, soleiðis at dómsnevndin avgjørdi at geva teimum fyrstu virðisløn fyri avrik teirra.

Stuttligt var hjá teimum at koma í skúla í Runavík týsmorgunin. Tíggjundi flokkur stóð og veittraði við fløggum, og allir næmingarnir fagnaðu teimum ófórt til morgunsangin. Hátíðarlig var løtan, tá skúlans leiðsla handaði teimum gávur sum eina viðurkenning fyri tað úrslit, tær høvdu fingið.

So er bert at vóna, at hesar ungu, evnaríku genturnar halda fram at arbeiða við tvørfloytuni, soleiðis at vit sleppa at hoyra tær eisini framyvir.



# Musikkskúlakonsert

*Árliga musikkskúlastevnan var hildin um vikuskiftið og 400 ungir luttakarar huganðu sær saman og saman við tónleiki*







**Myndir: Jens Kristian Vang**

DAGFINN OLSEN

Um vikuskiftið hittust 400 ungir tónleikarar úr øllum landinum í Havn.

Árliga musikkskúlastevnan var á skránni. Fríggjadagin og leygardagin fóru venjingar fram í Eysturskúlanum og á kvøldi vóru konsertir í Norðurlandahúsinum. 110 av luttakarunum gistu á Eysturskúlanum.

Sunnumorgunin var aðalroynd og sunnudagin konsert í Norðurlandahúsinum.

Martin Mouritsen, musikkskúlastjóri, sigur, at orsakað av nógvu luttakarunum, so sluppu ikki øll inn at lurta, ið høvdu ætlað sær, og bíðirøðin stóð út á vegin. Fyrsta orkestrið taldi 170 børn, tað næsta 90 og so framvegis.

Martin Mouritsen sigur, at tiltakið kann nú ikki verða størri. Ein møguleiki er at býta sundur, men upprunahugskotið við tiltakinum er, at børnini koma saman og hoyra onnur ljóðføri, enn síni egnu.

Hóast mongu luttakararnar, so gekk stevnan væl, men Martin Mouritsen heldur, at miðast má ímóti at fáa foreldur meira virkin, nú tiltakið er vorðið so stórt. Hann leggur tó dent á, at alt gekk væl og friðarliga fyri seg.

Serliga fegnast hann um, at konsertirnar ljómaðu framúr væl. Eisini, um sammett verður við undanfarin ár. Luttakararnir tyktust vera í góðari venjing og framgongd er at hóma.









**Nú** kann **PIZZA 67** sum nakað heilt nýtt bjóða øllum tykkum, ið eta á matstovu okkara ókeypis **breyðstengur** aftur við ella áðrenn matin, tá tit keypa pizza ella burgara. Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri øll tykkum, ið bíleggja mat og sjálvi avheinta hann...

***So minst til***: Næstu fer tú bíleggur pizza frá okkum og vit geva tær hesar **vælsmakkandi breyðstengurnar** afturvið, so er tað ikki tí, at vit hava tikið ímóti skeivum ordra - breyðstengurnur fylgja við, um tú etur tær ella ikki...

Tilboðið er galdandi til 1. juni 2000

Opið er:
**Mán.-frí.: 12-14 og 17-24**
**Ley. og sun.: 14-24**

til øll teirra, sum eta hjá okkum og teirra, ið sjálvi avheinta mat frá okkum...

PIZZA 67

Tinghúsvegur 8 • Tórshavn

TEL 35 67 67

petur & petur • 320870